# Føroysk flokssett til hádeild

**Juni 2024**




NÁM

Ajmi, Zakiya
**Eldgos (2023)**
Anna er saman við mammuni flýdd frá harðliga pápanum. Tær hava búð á eini kreppumiðstøð og eru nú fluttar í ein annan bý. Tær vilja gjarna byrja av nýggjum. Anna roynir at ríva seg leysa frá fortíðini og finna seg sjálva, samstundis sum hon fær nýggjar vinir og verður forelskað.
Floksstig: 8. – 10.
Síðutal: 176




---

Christensen, Ingun
**Skuggamyndir (2015)**
Skuggamyndir er eitt stuttsøgusavn við søgum, sum hanga saman. Lesarin fær onga heildarmynd, um tær ikki vera lisnar sum ein heild. Frásøgupallurin er ein bussur við ferðafólkum við hvør síni søgu sum flættast inn í hvørja aðra. Alt byrjar heima hjá einum ungum dreingi, har gentan er flutt inn. Á veg í skúla gerast tey ferðafólk í bussinum, og soleiðis byrjar frásøguumfarið.
Floksstig: 9. – 10.
Síðutal: 77




---

Christensen, Ingun
**Sólgrátur (2022)**
Aud er 15 ár og ættleidd. Hon heldur, at livið er strævið. Í skúlanum rópa tey ymiskt eftir henni. Eisini er Aud kedd um mammuna, sum ofta liggur í songini. Hon kennir seg einsamalla og ger sær nógvar tankar um Columbia, haðani hon er ættleidd. Støðan verður ikki betri, tá ið hon byrjar at fáa ólekkur boð inn á telefonina frá ókendum nummari. Við eitt verður alt bara enn truplari enn frammanundan.
Floksstig: 7. – 10.
Síðutal: 165




---

Colfer, Eoin
**Flogmaður (2009)**
Conor Broekhart var føddur til at flúgva. Tað kann tí valla undra, at hann gjørdist tann, hann gjørdist. Eina myrka nátt á stóru Saltoy varð lív hansara lagt í oyði, og eydnan tikin frá honum av eini óndsinnaðari og vælskipaðari svikagerð. Fyri at bjarga familju sínari og rætta ein ræðuligan skeivleika noyðist Conor at verða fyrstur at røkka dreyminum at flúgva.
Floksstig: 7. – 9.
Síðutal: 392




---

**Elskar elskar ikki (2010)**
Stuttsøgusavn við 16 stuttsøgum, ið er úrslit av samstarvi ímillum øll Norðurlond. Søgunar lýsa forelskilsi og kærleika, ikki bara tann tú vilt taka ímóti, men eisini tann tú helst vildi verið fyriuttan.
Floksstig: 8. – 10.
Síðutal: 200



Engombe, Lucia
**Barn nr. 95 – mín týsk-afrikanska odyssé (2009)**
7 ára gomul verður Lucia flutt úr frumskóginum í Afrika til DDR. Í sosialistiska Týsklandi skal hon, saman við 79 øðrum namibiskum børnum, læra at gerast partur av nýggju elituni í einum sjálvstøðugum Namibia. Ellivu ár seinni verður 18 ára gamla Lucia, saman við hinum DDR børnunum, flogin aftur til fullkomiliga fremmanda heimland sítt.
Floksstig: 8. – 10.
Síðutal: 323




---

Haddon, Mark
**Gátuføra málið um hundin í náttini (2006)**
Fimtan ára gamli Kristoffur hevur autismu. Hann hevur skil fyri støddfrøði og náttúruvísindi, men hann skilir ikki onnur menniskju. Tá ið hann ein dagin finnur hundin hjá grannanum dripnan, ger hann av at fara undir at skriva eina søgu um morðgátuna.
Floksstig: 9. – 10.
Síðutal: 246




---

Hagerup, Hilde
**Einkabarnið (2005)**
Um Elisu, sum hevur tað trupult. Hini siga, at hon lýgur, men hon hevur einki annað val, tí hon minnist einki frá barnaárunum, og mammuna nyttar einki at spyrja. Elisa fer aftur til barnaheimið at leita eftir sporum av lívinum og svarinum uppá, hví hon einki minnist.
Floksstig: 7. – 9.
Síðutal: 171




---

Haller, Bent
**Børn á markinum (2013)**
Brotprosa. Bókin snýr seg um børn, ið eru á markinum til eitthvørt og ikki altíð av egnum ávum. Og stendur tú á markinum, hevur tú eitt val: hvønn veg fert tú? Tað valið kanst tú sum lesari gera, meðan tað er verri hjá børnunum, ið her verða lýst. Søgurnar eru stuttar, bonskar og realistiskar bæði í evnisvali og máli.
Floksstig: 7. – 10.
Síðutal: 58




---

Helmsdal, Rakel
**Kjarr (2020)**
Ein beinagrind í einum kjarri. Ein knústur barndómur. Ein verð, sum tú ikki visti var til, men kanska hoyrir heima í. Eitt lítlafingurbein í lummanum og ein ryggsekkur á bakinum. Søgan um Lauru er ein ferð ígjøgnum minnir, manesjur við logandi kyndlum og leitan eftir svarum upp á brennandi spurningar. Einasta vitnið: dagbókin.
Floksstig: 8. – 10.
Síðutal: 440



Helmsdal, Rakel
**Hon, sum róði eftir ælaboganum (2014)**
Argantael hevur alt tað nýggjasta, og í skúlanum síggja vinkonurnar upp til hana. Tað sær út, sum hon hevur alt, hon ynskja sær, men tað hevur hon ikki, tí Argantael ynskir sær foreldur, sum eru góð við hana. Men foreldrini megna ikki at seta hana í miðdepilin. Argantael er tó sterk, líka til ein onnur kemur ímillum hana og Dagan, dreingin, sum hon er forelskað í.
Floksstig: 9. – 10.
Síðutal: 124




---

Hübbe, Camilla
**Norð (2019)**
Norð fer at leita eftir mammuni, sum er horvin. Hon hittir lívsklóku lagnugudinnurnar og íkornadreingin, Ratatosk, sum vísa henni veg niður í Nivlheim. Her djúpt inni í kjarnuni á jørðini er tann óndi drekin Niðhøggur í ferð við at gnaga lívsins træ, Yggdrasil, sundur. So við og við fatar Norð, at jørðin er við at ganga undir, og at hon er tann einasta, sum kann bjarga jørðini.
Floksstig: 7. – 9.
Síðutal: 191




---

Kennen, Ally
**Dýrið (2009)**
Stephen er ein drongur við einum vandamiklum loynidómi. Í fýra ár hevur hann hildið einum ræðuligum skapningi innilæstum á einum fjarløgdum goymistaði. Nú er ránsdjórið stórt og nóg svangt at bróta seg út úr rustaða búrinum.
Floksstig: 7. – 10.
Síðutal: 230




---

Kjelnæs, Marjun S.
**Skriva í sandin (2010)**
Stuttsøgusavn í 10 pørtum. Hendingarnar fara fram eitt vikuskifti í Havn, har tíggju ungfólk í aldrinum 16 – 20 ár verða lýst. Søgurnar flættast saman, og vit hoyra um ymsu hendingarnar frá ymsum sjónarhornum.
Floksstig: 8. – 10.
Síðutal: 153




---

Kjelnes, Marjun Syderbø
**Sum rótskot (2020)**
Hvat gert tú, tá ið fólk látast sum einki, meðan heimurin verður týndur? Og hvat gert tú, tá ið sjúka hóttir við at taka tína bestu vinkonu frá tær? Tú hugsar kanska sum Pax: hygg her, eg eri 16 ár, ókey, chill, men tá ið tú veruliga, veruliga hevur fingið nokk av bullshittinum? Hvat tá?
Floksstig: 8. – 10.
Síðutal: 123



Küchen, Maria
**Eg síggi meg sjálva í einum stolnum spegli (2011)**
Hetta er ein spennandi og sálarfrøðilig ungdómsskaldsøga um ektaðan kærleika og sonn og følsk vinaløg. Um deyðar mammur og livandi pápar. Um tann tú ert nú, og tann tú vart áðrenn – um tú nú veitst, hvør tú ert. Riana veit tað so ikki. Men hon ætlar at fáa greiðu á tí.
Floksstig: 9. – 10.
Síðutal: 163




---

Michelsen, Elin
**Rimarúmið (2021)**
Tóra veit, at hon hevur gjørt okkurt galið, men hon minnist ikki hvat. Hon endar í einum skúla, hon aldrin hevur hoyrt um, saman við fólkum, hon aldrin hevur sæð fyrr. Og tey duga ymiskt, sum ikki eigur at vera gjørligt. Kann hon vera ein teirra? Tóra má stremba eftir at finna útav, hvør hon sjálv er í einum heimi, sum vísir henni eina síðu, sum hon ikki ánaði var til.
Floksstig: 7. – 9.
Síðutal: 381




---

Nicolls, Sally
**At liva í allar ævir (2008)**
Eg eiti Sam. Tá ið tú lesur hesa bókina, eri eg allarhelst deyður. Soleiðis stendur at lesa á fyrstu blaðsíðu í hesi sera hjartanemandi og samstundis lívsjáttandi søguni um 11 ára gamla Sam, sum hevur blóðkrabbamein.
Sam vil vita alt og hava svar upp á spurningar, ið eingin vil svara.
Floksstig: 7. – 9.
Síðutal: 196




---

Nilsson, Johanna
**Dámar hata horuna (2013)**
Tær báðar Jonna og Gloria eru vinkonur. Tær sleppa at ganga í frið í skúlanum, líka til tær hava verið í einari veitslu, og mynd av Gloriu verður løgd út á netið, og ein bólkur verður gjørdur, sum eitur "Hata horuna". Jonna velur at hevna hetta, og tað fær álvarsamar avleiðingar, bæði fyri tær báðar ,Jonnu og Gloriu, men eisini fyri happaran.
Floksstig: 8. – 10.
Síðutal: 151




---

Palacio, R. J
**Hvíti fuglur (2020)**
Grafisk skaldsøga. Søga um dreingin Julian, ommu hansara Saru og Julien, vinmannin hjá ommuni. Meginparturin av søguni er um seinna heimsbardaga. Vit hoyra um lívið hjá ommu Julian, ið sum ung genta krógvaði seg fyri nasistunum í Fraklandi. Hetta er ein søga um ljósið í myrkrinum, um ómetaligt dirvi, vinalag og kærleika.
Floksstig: 7. – 10.
Síðutal: 220



Palacio, R. J.
**Undur (2017)**
August er føddur við einum andlitsfráviki, sum forðar honum í at ganga í vanligum skúla – líka til nú. Í grundini er August bara ein vanligur drongur við einum heilt serligum andliti. Men kann hann sannføra sínar nýggju floksfelagar um, at hann er akkurát sum teir, uttan mun til hvussu hann sær út?
Floksstig: 7. – 10.
Síðutal: 429




---

Philipps, Carolin
**Hvítar blómur í Gulu ánni (2007)**
Lea er ættleidd av týskum foreldrum. Tá ið hon hoyrir um kinesiska eitt-barns familjupolitikkin, verður hon so forfard, at hon fer til Kina at finna mammu sína. Søgan er ein ferð aftur í upprunalandið og ein ferð inn í sinnið, sum stríðist við spurningar um, hvør tú ert, um tú ert óynskt her á fold, ella um tú hevur onkran góðan.
Floksstig: 8. – 10.
Síðutal: 140




---

Philipps, Carolin
**Made in Vietnam (2011)**
14 ára gamla Lan stríðist undir ómenniskjaligum viðurskiftum í eini verksmiðju í Vietnam, sum ger nýmótans ítróttarskógvar til ung í vesturheiminum. Lan noyðist at halda út, tí at lønin tryggjar familjuni heima mat í munnin. Men so fær hon óvæntaða hjálp.
Floksstig: 8. – 10.
Síðutal: 136




---

Philipps, Carolin
**Tá ið tú ikki eigur orð (2013)**
Kristian livir í eini at síggja til normalari familju. Men hann hevur leingi havt eina nívandi pínu í búkinum. Tað er hetta við at pápi hansara noyðir hann at spæla mannfólkaspøl, og at hann ikki torir at siga nøkrum frá hesum. Hann letur bara tann ræðuliga loynidómin koma til sjóndar á tekniblokkinum.
Floksstig: 8. – 10.
Síðutal: 112




---

Riordan, James
**Sniðskjúttin (2012)**
Søga um ein tannáring, ið gjørdist sniðskjútti í 1942. Hansara uppgáva var at skjóta so nógvar týskar hermenn sum gjørligt. Í byrjanini kennist tað sera torført at skjóta, men so við og við gerst tað lættari.
Floksstig: 9. – 10.
Síðutal: 220




NÁM

Simukka, Salla
**So reyð sum blóð (2015)**
Krimisøga. Lumikki Andersson er 17 ár, hon er sterk, fræls og ógvuliga einsamøll. Helst, tí at hon vil hava tað soleiðis, hon lítir ikki á nakran. Ein dag finnur hon pengaseðlar, sum hanga blóðdálkaðir á einum snóri í myrkakamarinum í skúlanum. Lumikki verður drigin inn í finsku undirverðini, nú er hon ikki longur eygleiðari, men skotskiva.
Floksstig: 7. – 9.
Síðutal: 217




---

Stranger, Simon
**Barsakh (2014)**
15 ára gamla Emilia er og ferðast við familjuni á Gran Canaria. Á einum rennitúri sær hon ein bát, sum er fullur av flóttum. Tey vita, at um politiið finnur tey, verða tey send aftur til Afrika. Emilia ger alt, hon kann, fyri at hjálpa flóttunum. Ein av flóttunum er Samuel úr Ghana, sum í søguni sigur frá, hví hann er flýddur, og hvussu ferðin hevur verið.
Floksstig: 7. – 10.
Síðutal: 139




---

Stranger, Simon
**Tey, sum ikki eru til (2016)**
Samuel veit, hvat tað vil siga at lata alt frá sær við vón um eitt nýtt og betri lív í Evropa. Hann hevur fyrr roynt at flýggja úr Vesturafrika til Kanariuoyggjarnar. Emilia royndi at hjálpa, men kortini varð hann sendur aftur. Tað seinasta, Emilia gav honum, áðrenn hann varð noyddur avstað, var ein pappírslepi við bústaði hennara á. Nú stendur Samuel uttan fyri húsini, har hon býr í Bærum.
Floksstig: 7. – 10.
Síðutal: 200




---

Sund, Torvald
**Dansa fyri lívinum (2012)**
Søgan um ballettdansarinnuna og útróðrarmannin er hugtakandi. Julia og Rúnar eru par, men tey kunnu ikki vera saman, tí Julia skal á dansiskúla í Onglandi og Rúnar er fiskimaður í Noregi. Ein dag fara tey túr við bátinum, men tað gongur ikki væl. Rúnar verður fastur ímillum nakrar steinar og Julia má fara eftir hjálp, áðrenn flóðin kemur.
Floksstig: 9. – 10.
Síðutal: 90




---

Svingen, Arne
**Dagar, eg havi gloymt (2010)**
Grafisk skaldsøga. Søgan er um dagar, tú átti at minst. Og nakrar dagar, tú ikki vilt minnast. Tað er summarið, tá ið alt tað besta og tað ringasta hendir. Dávið og Tomm eru forelskaðir í Lisu. Lisa velur Dávið, men ger tað liðugt við hann stutt eftir, at tey hava skeldast. Síðan hvørvur Lisa á gátuføran hátt.
Floksstig: 8. – 10.
Síðutal: 190



Teller, Janne
**Onki (2013)**
Tað er av meiningsloysi, at Pierre Anthon, sum gongur í sjeynda flokki, fer upp í eitt træ at seta seg at tveita blommur eftir floksfeløgunum og eisini at tveita uppáhald niður yvir tey um, at onki hevur týdning. Tá ið Pierre Anthon reisir seg upp í flokkinum og fer, letur hann hurðina standa á gloppi, og harvið hevur hann boðið hinum av.
Floksstig: 7. – 10.
Síðutal: 161




---

Teller, Janne
**Um kríggj var í Norðurlondum (2018)**
Ímynda tær, at tað er kríggj – ikki í Afganistan ella Sýria ella í onkrum øðrum landi langt burturi – men í Evropa, í Føroyum, hjá okkum. Høvundurin bjóðar lesaranum at gera eina hugaroynd. Við at venda sjónarhorninum á fær hon okkum at skilja, hvat tað í veruleikanum merkir, at vera flóttafólk.
Floksstig: 7. – 9.
Síðutal: 56




---

Thydell, Johanna
**Ein terningur manglar (2011)**
Hetta er søgan um gentuna Puck, sum er so bangin og roynir at gera alt fyri ikki at missa stýringina við tilveruni. Puck er bangin fyri illsintum røddum, bangin fyri at fólk skulu hvørva. Hetta er ein søga um svik og vreiði, men eisini um vinalag, kærleika og kanska sáttargerð.
Floksstig: 7. – 9.
Síðutal: 210




---

Yousafzai, Malala
**Eg eri Malala (2015)**
Malala Yousafzai sigur søguna um, hvussu hon, sum 12 ára gomul, nærum var dripin fyri stríð sítt fyri, at gentur skulu sleppa at ganga í skúla. Bókin er endurminningar frá hennara merkisverda lívi og frá tíðini í Pakistan. Malala er tann yngsta, sum nakrantíð hevur fingið Friðarheiðursløn Nobels.
Floksstig: 8. – 10.
Síðutal: 262




---

Zak, Monica
**Alex Dogboy (2010)**
Tá Alex er fýra ár, rýmir mamman. Seinni letur pápin hann upp í hendurnar á fastrini og flytir aftan á mammuni. Fastirin er góð við hann, men Alex kennir seg ikki heima har, og tí flytir hann út á gøtuna, har hann er fyri nógvum ræðuligum hendingum. Men lívið hjá honum broytist, tá ið hann tekur sær av einum hálvdeyðum hundahvølpi, ið verður besti vinur hansara.
Floksstig: 7. – 9.
Síðutal: 229

